## Rotin fiskur í Rio

Tað luktar sera illa á teirri annars so væl umtóktu Ipanema-strondini í Brasil í hesum døgum, tí nakað norðari liggja umleið 80 tons av deyðum fiski. Tað er líkt til, at fiskurin rak á land seinasta vikuskiftið, og fiskifrøðingar halda, at hann kann vera deyður av eitrandi algum. Ein onnur frágreiðing kann vera, at fiskurin doyði, tí sjógvurin kølnaði ógvuliga knappliga, skrivar AP. Myndugleikarnir halda ikki, at tilburðurin hevur nakað við dálking at gera, men tann møguleikin verður kortini kannaður.

## Emanuel í andróðri

Starvsfólkaleiðarin í Hvítu Húsunum, Emanuel Rahm, sum er ovasti embætismaður hjá Barack Obama, forseta, er komin í politiskan andróður. Ein demokratiskur politikari vil vera við, at starvsfólkaleiðarin kom við illsinnisglepsum og hóttanum ímóti sær í einum skiftirúmi í Kongressini. Sum embætismaður skal Emanuel Rahm royna at tryggja uppskotum forsetans nóg nógvar atkvøður í Kongressini, men fleiri kongresslimir siga, at hann er bæði ógvusligur og ósiðiligur í sínari framferð.



# Politiskt støðuloysi

**Manglandi politiska dirvið til at skilja ímillum ítriv og yrkislist er drepandi fyri alt tað listarliga umhvørvið í Føroyum, var ein av niðurstøðunum á kjakfundi í Miðlahúsinum gjárkvøldið**

LISTAKJAK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Møguliga var tað eitt tekin, at onki umboð fyri mentanarpolitiska myndugleikan hevði ómakað sær á kjakfund í gjárkvøldið, um hvør skal gera av, hvat góð list er, hvat slag av list skal stuðlast ella um listin í Føroyum yvirhøvur eigur at fáa almennan stuðul. Í øllum førum var breið semja á fundinum um, at manglandi politiska dirvið til at skyna ímillum úrvalslist og fólksliga list endar við, at hvørgin fær røttu karmarnar at arbeiða í og harvið heldur ikki møguleika at menna seg.

### Palleba sum serfrøðingur

Ræðslan hjá føroyskum politikararum fyri at peika út serliga góðu listina og harvið tey fólkini, sum duga at meta fakliga um list, er ein tann størsti trupulleikin í listarliga umhvørvinum í løtuni, vildu fleiri vera við. Tí sum onkur tók til »Fellur úrvalslistin, so tekur hon áhugalistina við sær í fallinum«. Hví politikarar eru so bangnir fyri at lata listarligu fakligheitina sleppa framat, er ilt at gita um, men kanska er tað óttin fyri at missa atkvøður í breiðu fjøldini, fyrislóð Sjúrður Skaale, orðstýrari og stigtakari til fundin, sum Tjóðveldi skipaði fyri.

Sambært Inger S. Sørensen má listarliga umhvørvið í øllum førum bara staðfesta ferð eftir ferð, at tað ikki fellir fólki ella politikararum natúrligt at lurta eftir meiningunum hjá fakfólkum, tá tað ræður um list. Sjálv hevði hon undrast yvir, at fleiri eftirlýstu Palleba í panelinum, nú hesin kjakfundurin um list skuldi fáast í lag, har hon sjálv sum listfrøðingur, Oddfríður M. Rasmussen, sum rithøvundi og formaður fyri Listafólkasambandið, og Jenny Petersen, stjóri á Tjóðpallinum vóru biðin at taka lut.

– Hevði tað eisini verið natúrligt at biðið Palleba komið við einum innleggi á einum fundi um búskaparligu støðuna í landinum ella um krabbameinsgransking? Hví er tað so umráðandi at hava ófaklærd fólk við, júst tá tað ræður um list? Jú, tað er sjálvandi tí, vit ikki vilja hava serfrøðingar at fortelja okkum, hvat vit skulu dáma, og hvat góð list er Hetta hóast tað bæði krevur vitan um og fatan av list at skapa røttu umstøðurnar, so listin kann mennast, segði Inger Smærup Sørensen

Um onkur allíkavæl hevði hug at fýlast á, at panelið hetta kvøldi var nakað innetið, kundi hon ugga við, at hugburðurin um at »Alt er list« hevur tað betri enn nakrantíð. Bæði í miðlunum og á Facebook eins og hjá politikararum og stuðulsskipanum, so tann síðan av sakini skal nokk klára seg.

Verri er við yrkislistini, tí sum er, klárar onki listafólk seg fíggjarliga í longri tíð við stuðlinum, sum tað almenna letur, minti Oddfríður M. Rasmussen á. Og møgulig snýr tað seg nettupp um politiskar atkvøður, helt hann.

– Um list var ein banki ella Smyril Linie, so skuldu milliónirnar nokk komið á borðið. Sjálvt tey, sum aldrin ferðast við Smyril Line, mugu finna seg í, at teirra skattakrónur máttu spýtast í fyritøkuna. Hví skal tað so vera ein grundgeving, at vit ikki kunnu stuðla úrvalslist, tí so fá brúka hana, spurdi Oddfríður M. Rasmussen.

### Listin eigur ongan Pál Joensen

Møguliga hongur tað saman, við at list ikki kann mátast, skjeyt orðstýrarin upp. Kanska orsøkin er, at listin ongan Pál Joensen eigur, sum kann peika politikararum á, hvussu nógv sekund hann svimur skjótari enn onnur. Ein umsókn um stuðul frá venjaranum hjá Pál fleyg gjøgnum løgtingið, uttan at nakar settir spurnartekin við tað, tí úrslitini hjá svimjaranum jú kundu mátast, minti orðstýrarin á.

Hetta helt Jenny Petersen, stjóri á Tjóðpallinum, vera eina heldur ullinta grundgeving.

– Um politikararnir ikki halda seg duga at máta list, so skulu teir jú nettupp kalla listarligu fakfólkini inn, at vísa teimum, hvussu man ger, helt hon.

Alt gott um Pál Joensen, »men hann kann jú bróta beinið í morgin«, sum Inger S. Sørensen tók til. Tí dugdi hon heldur ikki at síggja, hví manglandi vissan fyri ítøkiligum úrslitum skal vera ein grundgeving fyri, at tað er truplari at stuðla listini

Eisini Andrea Heindriksdóttir, tónleikari, fýltist á samanberingina við ítróttarfólk. Veruleikin er, at nógv av teimum ítróttaravrikum, sum verða blást upp í miðlunum, ikki standa mát í altjóða høpi, vísti hon á.

– Onkur føroyingur endar sum nummar 44 í onkrari ítróttarkapping uttanlands, og beinanvegin verður tað hálova sum nakað heilt fantastiskt. Veruleikin er, at nógv føroysk ítróttarfólk klára seg munandi verri enn nógv føroysk listafólk uttanlands, men hava kortini nógv lættari við at fáa almennan stuðul, segði Andrea Heindriksdóttir.

### 40.000 kr fyri 7 ár

Ein orsøkin kann vera, at føroysk listafólk ikki duga nóg væl at gera seg sjálvan sjónlig, helt Birgir Kruse, ritstjóri.

– Sum er, hevur listin ongan veruligan, afturvendandi platform at gera vart við seg á. So kravið til listafólk má vera, at tey leggja størri orku í at gera vart við seg eisini uttanlands, segði Birgir Kruse.

Men tað er kanska ikki heilt so einfalt, tí nógv føroysk listafólk eru bundin av føroyska heimamarknaðinum – ikki minst tey sum skriva, minti Carl Jóhan Jensen, rithøvundur, á.

– Mín skaldsøga *Ó* hevur selt á leið 1200 eintøk, og tað gevur mær 40.000 krónur í løn fyri sjey ára arbeiði. 1200 eintøk høvdu svarað til eini 100.000 í Danmark, og tað hevði givið mær eina milliónainntøku, segði Carl Jóhan Jensen.

Eisini Tróndur Patursson, listamaður, avdúkaði, at hann ongantíð hevur havt fíggjarligt rásarúm til savna seg um sína list í longri, samanhangandi tíðarskeið.

– Tí havi eg eisini hugsað um at taka av einum tilboði um at gerast lærari í glaslist uttanlands. Eisini tí tað er so óliviligt her sum listafólk, so leingi ófaklærd fólk stinga listarligar kósir út í kortið og tey faklærdu, sum vit hóast alt hava her heima, áhaldandi verða ignorerað, segði Tróndur Patursson.

### Kopiveldið má steðga

Uttan listina, sum skarar framúr, flyta vit heldur ongi mørk, staðfesti Sunleif Rasmussen, komponistur.

– Vit halda okkum vera so ómetaliga original, men veruleikin er, at vit liva í eini listarligari kuvøsu, har lítil og ongin luft kemur útifrá. Tí eiga listafólk at fara út um landoddarnar og royna at gera seg galdandi aðrastaðni, um vit skulu mennast listarliga. Hetta listarliga kopiveldið, sum ræður her heima, má steðga. Og fyrsta treytin er, at vit duga at skyna á, hvat veruliga góð list er, segði Sunleif Rasmussen, sum eisini fýltist á, at eitt nú Sosialurin er farin at kalla annaðhvørt fólk fyri listafólk.

Besta dømið um at politikararnir ikki duga at anda inn, tá verulig góðskuluft endiliga kemur útífrá er lagnan hjá stóru Lista-



*Nógv fólk var møtt til fundin um støðuna hjá listini í Føroyum, men onki umboð fyri mentanarpolitiska myndugleikan var at hóma*